# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## HANUS Í SUMBA

Hanus G. Johansen, sum er landskendur fyri at seta løg til yrkingar hjá Poul F. Joensen. Hann var ættaður úr Hørg í Sumba, og leygarkvøldið fer Hanus at framføra sínar vísur í Sumba. Tað verður í Samkomuhúsinum, og tiltakið verður frá kl. 19.30 og til midnátt.

**HANUS G. JOHANSEN**
Samkomuhúsið í Sumba
Leygarkvøldið 9/4 kl. 19.30



## MARTIN Á PALL TÝSKVØLDIÐ

Martin Joensen fer týskvøldið at hava konsert í Sjónleikarhúsinum í Havn. Hann fer at framføra løg, sum hann hevur givið út gjøgnum árini. Martin gav í fjør nýggja fløgu út, og hann fer sjálvsagt at tríva í fleiri sangir frá teirri útgávuni. Martin hevur væl mannaðan bólk við sær á pallin.

**MARTIN JOENSEN**
Sjónleikarhúsið í Havn
Týskvøldið 12/4



## SANGSKRIVARAR Á KASPAR

Hesa vikuna hevur Brett Perkins hildið altjóða sangskrivaraskeið í Føroyum, og leygarkvøldið skulu luttakarar frá skeiðnum framføra á Kafé Kaspar í Havn. Tey, sum taka lut, eru Vígdis Fjallstein, Signar í Homrum, Annemarie Zimakoff (DK), Parisch Browne (Írland), Bjorn Zetterqvist (Svøríki), Guðrið Hansdóttir og Brett Perkins (USA).

**LIVE-TÓNLEIKUR**
Kafe Kaspar
Leygarkvøldið 9/4 kl. 20.00



## BINDA Í NORÐURLANDAHÚSINUM

Norðurlandahúsið bjóðar enn einaferð vælkomin til eitt av sínum vælumtóktu bindiskeiðum. Hesa ferð verður tað sum sagt danski bindisniðgevin Laura Terkildsen, ið undirvísir, og er hetta aðru fer at hon bjóðar sína servitan innan binding. Skeiðið byrjar við einari hugvekjandi framløgu, ið skal virka sum íblástur til arbeiðssetningin hesar báðar dagarnar: frá bindiprøva til liðugt produkt.

**BINDISKEIÐ**
Norðurlandahúsið í Havn
Fríggjadagin 8/4 og leygardagin 9/4




## VILL RENNING Í SUÐUROY

Um vikuskitfið verður tiltakið Vilt de Suðuroy. Hetta er renni/gongutiltak, har fólk renna úr Sumba til Sandvíkar. Brúktir verða tríggir dagar um teinin, og undanfarin tiltøk hava hepnast sera væl. Nógv fólk hava luttikið, og tað hevur verið sera hugnaligt at verið við, verður sagt. Meira kann lesast um renningina á vilt.fo.

**VILT DE SUÐUROY**
8/4-10/4



## SO RULLAR FÓTBÓLTURIN AFTUR

Hetta vikuskiftið verður rættiliga lagt til brots í fótbóltskappingini hjá monnum. Dystir eru spældir í steypakappingini, men nú byrjar landskappingin. Fyrsta umfar verður spælt um vikuskiftið, og spennandi verður at fylgja feløgunum, sum hava sett sær síni mál fyri 2011. HB eru føroyameistarar, men teirra avrik hava ikki verið sannførandi seinastu vikurnar. Nu skal HB visa, at teir eru við í kappingini um FM-gullið.

**VODAFONEDEILDIN**
Sunnudagin 10/4